## Tunnilin ávirkar

Hóast tað fara at ganga nøkur ár, áðrenn tað ber til at koyra undir Skopunarfirði, hevur tunnilsætlanin longu fingið sína ávirkan. Í hvussu er er áhugin fyri grundstykkjum í Skopun vaksin nógv. Fyri kortum gjørdi kommunan eina útstykking við 22 stykkjum, og nú er ætlanin at gera 12 afturat. Gerhard Lognberg, bygdarráðsformaður, sigur við Útvarpið, at tað eru yvirhøvur fólk við tilknýti til bygdina, sum ætla at búseta seg í Skopun.

## Etiskir fyrilestrar

Í morgin, 12. apríl, hevur Føroya felag móti krabbameini, aðalfund í Listaskálanum í Havn, og hesaferð verður serligur dentur lagdur á etikk. Felagið hevur fingið Hans Paula Strøm, landsstýrismann at seta hol á kjakið í krabbameinshøpi, og síðani fer leiðarin í etiska ráðnum hjá norska sjúkrarøktarfrøðifelagnum, Maria Aakre, at halda fyrilestur um etiska tvídráttin, tá tað snýr seg um krabbamein og deyða. Fyrilestrarnir byrja kl.19.

Stefan Vilner, undirstjóri hjá Sterling:

# Umhugsa at flúgva upp á Føroyar



*Størri parturin av flotanum hjá Sterling er Boeing 737-800, við plássi til 189 ferðafólk. Hetta eru heldur størri flogfør enn 737-300, sum Maersk at enda nýtti á Føroyarutuni.*

*Mynd: Sterling*

**Ongar ítøkiligar ætlanir eru um at flúgva upp á Føroyar, men sambært leiðsluni í Sterling, er tað langt frá óhugsandi, at felagið seinni fer at seta eina tílíka rutu á stovn**

FLOGFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Søgur hava seinastu dagarnar gingið um, at íslendska lágprís flogfelagið Sterling umhugsar at seta á stovn rutu millum Keypmannahavn og Vágar. Og marknaðarleiðarin hjá stóra íslendska felagnum avvísir ikki, at tað væl kann gerast veruleiki.

- Í løtuni hava vit so nógv jørn í eldinum, so beint nú hendir einki. Og mær vitandi hava vit heldur ikki sett nakra kanning í verk at lodda dýpið í sambandi hesa rutu, sigur Stefan Vilner, undirstjóri í Sterling

Marknaðarleiðarin greiðir frá, at hjá teimum er tað so, at ymsu ruturnar fyrst verða settar á ein lista, og síðani verða gjølligar kanningar gjørdar av møguleikunum fyri at upprætta umrøddu rutu. Og kannningar eru sum nevnt ikki gjørdar enn í sambandi við eina møguliga Føroyarutu.

### Avgjørt áhugavert

Treyðugt so hava teir á Sterling skeitt eitt sindur at flogmøguleikunum millum Danmark og Føroya, og teir hava fylgt so mikið væl við, at teir vita, at nú er bert eitt flogfelag á rutuni.

Sterling røkir frammanundan fastar rutur millum einar 35 farleiðir í Europa og Norðurlondum. Í fjør flutti felagið 5,3 milliónir ferðafólk í ógvuliga framkomnum flogførum, í flestu førum Boeing 737-800, ið tekur 189 fólk.

- Føroyar sum rutumál er avgjørt áhugavert fyri okkum. Vit kanna alla tíðina møguleikar fyri at menna okkum, og sjálvt um einki ítøkiligt er í umbúna í løtuni, er tað langt frá óhugsandi, at vit einaferð seinni fara at flúgva upp á Vágar, sigur Stefan Vilner, uttan tó at vilja seta tíðarfreist á.

Bjarni Djurholm, landsstýrimaður:

# Sterling skal vera vælkomið


*Vil Sterling bjóða seg fram á Føroyarutuni, skulu teir verða bjóðaðir vælkomnir frá okkara síðu, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.*

*Savnsmynd*

**- Loftferðsla er danskt málsøki, og tí er tað ikki vist, at Vinnumálaráðið verður eftirspurt, um Sterling ætlar at flúgva upp á Føroyar, sigur Bjarni Djurholm**

FLOGFERÐSLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin*

Føroyskir myndugleikar eru ikki partur av málinum, tá flogfeløg søkja um loyvi at flúgva upp á Føroyar. Málsøkið er nevniliga danskt burturav.

Bjarni Djurholm sigur, at Vinnumálaráðið bara er hoyringspartur, tá tað kemur til koncessiónir, og at teir sum oftast bert eru eftirspurdir, tá tað snýr seg um prísir.

- Grovt sagt kann mann siga, at vit bert sleppa at tosa, um danir tíma at lurta, sigur landsstýrismaðurin.

Í sambandi við tíðindini um, at Sterling møguliga fer at flúgva upp á Føroyar sigur Bjarni Djurholm, at teirra grundleggjandi støða er, at á øllum økjum, har fleiri enn ein bjóða seg fram, er tað betri fyri brúkaran, og harvið eisini fyri samfelagið.

- Vit mettu tað vera eitt stórt framstig, tá FaroJet bjóðaði seg fram á Føroyarutuni. Nú vísti tað seg tíverri, at felagnum varð ikki lív lagað, og tað er harmiligt. Men vil Sterling bjóða seg fram á Føroyaleiðini, skulu teir verða bodnir vælkomnir frá okkara síðu, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.